UMHVØRVIS- OG VINNUMÁLARÁÐIÐ
Ministry of Environment, Industry and Trade

Tórshavn, tann 14. september 2021
Málsnr.: 21/17106

# Hoyring

Umhvørvis- og vinnumálaráðið sendir við hesum uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um tinglýsing til hoyringar.

Við núverandi orðing í § 43, stk. 1 í tinglýsingarlógini sýnist tað sum um tinglýsingarmyndugleikin ikki hevur heimild at tinglýsa onnur skjøl í persónbókini enn tey skjøl, sum eru nevnd í sjálvari tinglýsingarlógini.

Við at seta orðingina "*ella aðrari lóggávu*" inn í § 43, stk. 1, ger uppskotið heimildargrundarlagið hjá tinglýsingarmyndugleikanum greiðari, tá ið tinglýsast skal í persónbókini sambært aðrari lóggávu, t.d. § 27 í lógini um framtíðarfulltrú.

Eisini eru nakrar málsligar broytingar uttan rættarligt innihald gjørdar í §§ 47 d og 47 e.

Høgni Iversen
Fulltrúi / Legal Advisor

Umhvørvis- og vinnumálaráðið / Ministry of Environment, Industry and Trade
Tel. +298 55 60 74
hognii@uvmr.fo • www.uvmr.fo